# LØGTINGSVAL04



John Willian Joensen
*Sambandsflokkurin,*
*Norðoya valdømi*



John Johannessen
*Javnaðarflokkurin,*
*Suðurstreymoyar valdømi*




## Fjølmiðlar ....................

**Skulu Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya leggjast saman?**

Eg kann ikki góðtaka niðurgerðina av SVF seinastu tíðina. Pioneertíðin hjá SVF er liðug, og í dag arbeiðir ongin fyri einkiheldur ikki Fólkafloksmenn. Vit skulu hava eitt føroyskt sjónvarp og tveir sterkar loftmiðlar til frama fyri føroysku tjóðina

Nei, eg haldi ikki at Útvarpið og Sjónvarpið skulu leggja saman. Tað er umráðandi, at vit hava tveir ymiskar almennar loftmiðlar við Public Service skyldu. Serliga er hetta umráðandi, tá vit tosa um tíðindaflutningin. Tá vit hava eitt útvarp og eitt sjónvarp, er møguleiki fyri, at hesi velja at viðgera eitt stórmál fullkomiliga á hvør sín hátt. Tað er styrkjandi fyri fólkaræðið. Fáa vit bara ein stóran almennan loftmiðil, er vandi fyri, at vit fáa ein einstáttaðan tíðindaflutning. Í mínari verð er hetta eitt afturstig

**Eiga partar av útvarpsgjaldinum at fara til aðrar útvarpsstøðir?**

Útvarp Føroya eigur at síggja í eyguni, at útvarpsgjaldið fer at lækka í framtíðini og sum frálíðir fer Útvarp Føroya ikki at fáa nakað útvarpsgjald. Útvarp Føroya eigur í framtíðini at kappast undir somu treytum sum privatu útvarpstøðirnar

Nei, tí hinar útvarpsstøðirnar hava ikki tær somu strongu Public Service skyldurnar at halda seg til, sum Útvarp Føroya hevur. Smáu útvarpsstøðirnar hava fríðar teymar at gera sum tær vilja og at vinna pening, sum tær vilja. Tí skulu tær ikki hava burtur av útvarpsgjaldinum.

**Eiga borgararnir at hava møguleika fyri at kæra um tíðindaflutning hjá fjølmiðlunum ?**

Ja tað skulu teir. Komandi lógin um fjølmiðlaábyrgd eigur at fáa ein kærustovn at virka

Sjálvandi. Tað er ikki annað enn rímiligt. Fjølmiðlarnir í Føroyum hava bíðað seinastu seks árini at fáa ta lovaðu Fjølmiðlaábyrgdarlógina, sum skal áseta ábyrgdina hjá fjølmiðlunum mótvegis borgarunum. Hendan lógin skal eisini áseta, hvussu borgarin kann venda sær til eina nevnd, sum viðgerð tíðindaflutningin og ger eina niðurstøðu. Má skoyta uppí, at eg eisini haldi tað vera ógvuliga umráðandi at loysa almennu loftmiðlarnar frá politiska myndugleikanum. Hetta kann gerast við at seta eina nevnd ímillum landsstýrismannin í menamálum og sjónvarpsstjóran ella útvarps-0stjóran, so greitt skott er ímillum.

**Hvørja sending dámar tær betur - 15 tær bestu ella Hvat nú?**

Mær dámar Johnny Cash

15 tær bestu.



*Ein av stóru uppgávunum hjá nýggju felagskommununi verður at gera røktarheim á Streymnesi*

# Balanserað samanlegging er søgulig

**Sunda kommuna er ein natúrlig samanlegging av seks javnstillaðum kommunum við drúgvum royndum í sínámillum samstarvi – og skal fyri skattaborgaran innibera sparingar heldur enn eyka kostnaðir**

FYRISITING
*Búi Tyril /*
*PRnewsMedia.com*

Niðurteljingin til tann 1. januar 2005 er byrjað og tær seks samanleggjandi kommunurnar við Sundalagið eru fult í gongd við sínar fyrireikingar. Sáttmálin um samanlegging varð í november undirskrivaður av fimm av teimum seks.

Hóast ivandi sálir í Hósvík enn ikki hava skrivað undir nakað sum helst, og Føroya Landsstýri enn minni í sínum núverandi standi hevur gjørt nakað fyri konfirmera ta endaligu konstellatiónina, so tykist full vissa valda um at hetta søguliga stig verður gjøgnumført til ásetta tíð.

– Her er ikki talan um nakra samanlegging av bornholmskum slag, viðmerkir skrivarin hjá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum, Jens Dalsgaard.

– Vit tosa ikki um dýrar og fløktar prosessir. Tvørturímóti snýr tað seg um at varðveita skipanir og útbyggja og menna eitt longu etablerað samstarv við nógvum árum á baki. Hetta er ikki ein lítil kommuna sum hektar seg uppá hjá einari fríggjandi størri kommunu; hetta er hinvegin ein balanserað avgerð, eitt natúrligt stig at taka fyri nakrar javnstillaðar smærri kommunur sum væl umhugsað kunnu gera sína umsiting effektivari við at leggja saman. Og hetta er fyrstu ferð í Føroyum at tílíkt hendir.

### Røktarheim í gerð

Til kommunuvalið í november verður samanleggingin longu veruleiki og ein felags fíggjarætlan skal eisini gerast í ár fyri ta nýggju kommununa. Nýtt felags bókhald og ein nýggj felags skipan fyri journalir skal eisini verða klárt til ársbyrjan 2005. Kommunuskattur verður felags við sama skattaprosenti og harafturat skal samtykkjast ein felags stýriskipan, so tað skerst ikki burtur at nógv arbeiði liggur fyri framman, ikki minst hvat viðvíkur at fáa allar formligar staðfestingar og góðkenningar upp á pláss.

Men Jens Dalsgaard ber ikki ótta fyri lógarligum finurligheitum í sambandi við samanleggingina av Hósvík, Hvalvík og Streymnes, Saksun, núverandi Sunda kommuna við Oyri, Oyrabakka og Norðskála, Haldarsvík íroknað Langasand og Tjørnuvík, og Gjáar kommunu.

– Tann nýggja Sunda Kommuna yvirtekur bæði skyldur og rættindir hjá teimum samanleggjandi kommunalu eindunum. Hetta er jú ikki nakað partafelag men ein almennur myndugleiki sum verður sameindur; møgulig krøv móti støkum kommunalum eindum verða yvirførd til ta nýggju felags eindina.

– Eg dugi ikki at síggja nakrar komplikatiónir í hesum tí hetta er eitt væl regulerað lógarøki, vit hava jú kommunulógina. Fortreytin her er tað traditionella samstarvið hjá hesum kommunum; tí kunnu eisini funktiónir halda fram sum tær hava gjørt. Úrslitið av samanleggingini verður betri møguleikar til góða planlegging og betri tænasta til borgaran.

Millum tey størru nýggju projektini sum kommunurnar í Sundalagnum arbeiða við kann nevnast eitt røktarheim í Streymnesi, eitt projekt kommunurnar í nógv ár hava arbeitt við.




